Lærarafelag Handilsskúlans:

# Fíggjarmálastýrið rennur undan

**Samráðingarnar millum Lærarafelag Handilsskúlans og Fíggjarmálastýrið eru slitnaðar. Málið um pensjónsupptakið liggur tí framvegis óloyst, og sigur Lærarafelag Handilsskúlans, at tað er Fíggjarmálastýrið, sum rennur undan pensjónsupptakinum, og hetta hava teir gjørt alt samgonguskeiðið**

ÓSEMJA
*Ingrid Bjarnastein*

Málið gongur aftur heilt til 1988, tá ið blokkstuðulin kemur. Í tíðarskeiðnum frá 1988 – 1992 setur Mentamálastýrið 13 lærarar í starv á Handilsskúlanum. Í setanarskrivinum hjá hesum 13 læraranum gevur mentamálastýrið lærarunum rætt til eftirløn, sum arbeiðsgevarin hevur skyldu at syrgja fyri.

Samráðingarleiðarin hjá fíggjarmálastýrinum váttar í 1998 munnliga, at hesa skyldu hevur arbeiðsgevarin forsømt og at fíggjarmálastýrið hevur skyldu til at veita hesum lærarum tilsagnarpensjón, men tá Lærarafelag Handilsskúlans biðjur um eina skrivliga váttan, verður hetta noktað teimum.

Árið eftir skiftir Fìggjarmálastýrið meining, og sigur, at Lærarafelag Handilsskúlans skal gera ein sáttmála við fíggjarmálstýrið fyrst, áðrenn teir 13 lærararnir kunnu fáa eftirløn. Føroyskur sáttmáli skal gerast, tí higartil hava føroyskir handilsskúlalærarar brúkt danskar lønir og arbeiðstíðir, sum heimastýrið hevur góðkent síðani 1988.

– Fíggjarmálastýrið hevur ongantíð gjørt vart við, at teir eru ónøgdir við sáttmálan, sum hann er nú, sigur Fritleif Henriksen, formaður í Lærarafelag Handilsskúlans.

– Ein kann væl siga, at síðani 1988 hava ongar eftirlønir verið í lagið, og vit hava ikki havt nøkur tryggjaði eftirlønarviðurskifti.

**Sáttmálin**

Fíggjarmálastýrið krevur, at nýggi sáttmálin skal innihalda nýggjar arbeiðstíðarreglur, sum skulu nýtast ístaðin fyri tær donsku. Fyri tveimum árum síðani varð sáttmáli gjørdur millum Fíggjarmálstýrið, Yrkisfelagið og Felagið fyri Sjómansskúla- og Maskinskúlalærarar.

– Hesi feløg hava fingið heili tvey ár at tillaga seg, meðan fíggjarmálastýrið nú krevur, at vit skulu hálsa um uppá eini 14 dagar, og tað ber als ikki til, greiðir Fritleif Henriksen frá.

– Einasta kravið vit seta til sáttmálan er, at vit vilja staðfesta arbeiðstíðirnar, sum tær eru nú, og vit vilja hava eftirlønirnar í rættlag. Vit seta ongi lønarkrøv av nøkrum slag.

– Fíggjarmálastýrið fekk bræv frá okkum longu 18. desember, men vit fingu ikki fyrsta fundin fyrr enn 28. januar. Sìðani hevur Fíggjarmálastýrið avlýst eina røð av samráðingarfundum. Teir renna undan pensjónsupptakinum, og hetta hava teir gjørt alt samgonguskeiðið. Talan er um eini 10 – 15 milliónir krónur, sum eru forsømdar í pensjónsgjøldum.

Fritleif Henriksen sigur annars, at vónandi verða samráðingarnar tiknar uppaftur aftaná valið, tá nýggj samgonga er skipað.

– Tað kann ikki gerast verri enn tað er nú, og vónandi fáa vit ein hóvligari fíggjarmálaráðharra tá.

Lærarafelag Handilsskúlans hevur higartil noktað limum sínum at gera uppgávur til próvtøkurnar. Í ringasta føri kann hetta hava við sær, at ongin næmingur fær prógv av Handilsskúlanum í ár, men hetta verður støða tikin til á aðalfundi tann 12. apríl.



*Fritleif Henriksen, formaður í Lærarafelag Handilskúlans, sigur, at fíggjarmálastýrið rennur undan pensjónsupptøkuni*

*Mynd: Álvur*



Tjóðveldisflokkurin kunngjørt valskránna:

# Eins og fólkaatkvøða um fullveldi



*Tjóðveldisflokkurin boðar frá lagnuvalið 30. apríl. Fullveldiskósin skal haldast næstu fýra árini. Tjóðveldisflokkurin vil ikki peika á nakran serliga samstarvsfelaga.*

**Tjóðveldisflokkurin metir komandi løgtingsval sum eitt lagnuval í fullveldismálinum.**

*Myndir: Jens Kristian Vang*

VALSKRÁ
*Orð:Heri á Rógvi*

Tjóðveldisflokkurin skal vera trygdin fyri, at gongdin á fullveldisleið heldur áfram. Flokkurin setir sítt álit á, at Javnaðarflokkurin vendir kós eftir valið, soleiðis at pláss verður fyri honum í einari komandi samgongu. Av vallyftum teljast lægri skattur og fleiri tryggjað rættindi

–Tjóðveldisflokkurin skal vera trygdin fyri fullveldistilgongdini. Tað finnst bara ein loysn viðvíkjandi teimum ríkisrættarligu viðurskiftunum.

Soleiðis ljóðaði tað frá tjóðveldisfólki, tá Tjóðveldisflokkurin legði sína valskrá fram til komandi løgtingsval.

Við slagorðunum virði vinna vælferð, hevur Tjóðveldisflokkurin evnað til eina valskrá til løgtingsval.

Yvirskriftin í valskránni er lagnuvalið 2002.

Á tíðindafundi hósmorgunin legði floksformaðurin, Høgni Hoydal, valskránna fram. Til staðar vóru eisini løgtings- og landsstýrismenn floksins eins og nøkur valevni hjálptu til at fylla parnassið á Hafnia.

Saman við valskránni hevur Tjóðveldisflokkurin eisini útgivið tríggjar faldarar. Høgni Hoydal segði, at faldararnir vóru við til at afturvísa nakrar mýtur í sambandi við støðuna hjá føroyska samfelagnum og fullveldistilgongdina. Samstundis hevur Tjóðveldisflokkurin eisini dagført stevnuskránna Okkara land.

Tað er heldur ikki lítið í stendur at lesa í valskránni. Tjóðveldisflokkurin hevur nógvar og í flestum førum sera ítøkiligar ætlanir a øllum frontum tey komandi fýra árini.

**Lagnuval**

–Vit hava ongantíð verið nærri einum sjálvstøðugum og sjálvberandi Føroyum.

Hetta er fyrsti linja undir yvirskriftini lagnuvalið 2002 í valskrá Tjóðveldisfloksins. Flokkurin metir hetta valið sum lagnuvalið fyri fullveldi.

–Valið kann sammetast við eina fólkaatkvøðu um fullveldi, sigur Høgni Hoydal.

Tjóðveldisflokkurin er av teirri sannføring, at gongdin á fullveldisleið er komin langt ávegis, og tað hevur stóran týdning, at hendan gongdin heldur áfram. Flokkurin metir, at allar løgfrøðisligar og umsitingarligar fyrireikingar eru gjørdar. Tá búskapurin og samfelagið standa í besta blóma, so heldur Tjóðveldisflokkurin, at tíðin er komin til at taka avgerandi

*Framhald á síðu 25*



*Olga Biskupsstøð*



*Niklái Petersen*



*Per Simonsen*



*Heini O. Heinesen*



*Annita á Fríðriksmørk*



*Finnur Helmsdal*



*Halbjørg Hansen*



*Jógvan Arge*



*Jógvan Durhuus*



*Kristina Háfoss*



*Leivur Hansen*



*Rói Egholm*